# Stór viðurkenning til Maritu Dalsgaard í Danmark



**Sunnudagin fekk Marita Dalsgaard 20.000 krónur í virðisløn frá Skuespillerforeningen av 1879. Hetta er ein stórur heiður at fáa í Danmark og Marita er ovurfegin**

SJÓNLEIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Sunnudagin fekk Marita Dalsgaard handað eitt legat áljóðandi 20.000 krónur. Tað er Skuespillerforeningen af 1879 sum letur legatið. Skuespillerforeningen af 1879 er eitt slag av einum fakfelag hjá sjónleikarunum í Danmark, og flest allir danskir sjónleikarar eru limir har.

Tí verða legatini, sum Skuespillerforeningen af 1879 nógv vird, og legatið, sum Marita Dalsgaard fekk sunnudagin er millum tey størstu, ið verða latin. Tað eru ungir og evnaríkir sjónleikarar, ið flest øll legatini verða latin til, og peningaliga fekk Marita Dalsgaard tað største legatið, sum er upp á 20.000 krónur og eitur Georg Philipp-legatið.

### Segði bara takk

Marita fekk hetta handað til samkomu har 200 sjónleikarar vóru savnaðir. Og hóast Marita nakrar dagar framman undan hevði fingið fráboðanina við postinum, um at hon fekk eitt legat, so var hon so at siga málleys, tá hon tók ímóti tí.

– Eg var bæði smæðin og skelkað alt um eina leið, so eg segði bara takk, meðan fleiri av hinum, ið fingu legat, hildu langar takkartalur, sigur Marita Dalsgaard úr telefonini á einum hotellkamarið í Odense.

Hon er á turné í hesum døgum og spældi bæði í gjár, skal spæla í dag og í morgin, men fríggjadagin er hon so liðug.

– Tá fari eg so heim til børn og mann at halda jól, og tað gleði eg meg til, flennir Marita niður í hornið.

Jólafrítíðin hon nú fær er bæði uppiborin og tiltrongd. Marita hevur havt eitt strævna skrá seinastu tíðina, og komandi árið er fult av avbjóðingum, sum bíða eftir henni. Her í millum ein møgulig ferð til Føroya við sjónleikinum "Marie – en lidenskablig historie", og eisini ein vitjan í Skt. Pæturborg við einum øðrum leiki.

Við í skjáttuni tá, hevur Marita Dalsgaard eitt legat frá heimsins elsta felagsskapi fyri sjónleikarar, sum Skuespillerforeningen af 1879 er.

### Stór og rósandi orð

Gunvor Reystberg er næstformaður í Skuespillerforeningen af 1879, og hana spurdu vit hvørjar grundgevingarnar vóru, fyri at lata Maritu 20.000 við Georg Philipp-legatium.

– Marita vísti longu áðrenn hon fór á sjónleikaraskúla, at hon hevði stór evni. Tað gjørdi hon við sínum leikluti í filminum "Kun en pige". Á skúlanum vísti hon hvussu sterk hon er, og hvussu góður samskipari og stigtakari hon er. Og tað er hon framvegis.

– Marita stríðist, hon er serlig og hon er ein høg og flott kvinna, og allir hesir lutir hava gjørt, at hon nú hevur fingið Georg Philipp-legatið, sigur Gunvor Reystberg, næstformaður í Skuespillerforeningen af 1879.

Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari

## Spennandi útbúgvingar
### - eitt hav av vinnumøguleikum

**Nýtt skúlaár byrjar 3. januar 2007**

**Maskinmeistari**
Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar bæði á sjógvi og landi, líka mikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva elinnleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkurin. Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina er tvær ferðir um árið. Byrjar aftur í januar 2007.

**Maskinistur**
Maskinistútbúgvingin gevur møguleikar fyri at vera maskinstjóri á flestu veiðuførum, sum fiska á føroyskum sjóøki. Útbúgvingin gevur t.d. eisini rætt til at vera maskinstjóri á skipum við maskinorku upp til 3000 kW í altjóða sigling. Útbúgvingin tekur 9 mðr.

Upptøka til maskinistútbúgvingina er eina ferð um árið og byrjar aftur í august 2007.

**Skipari**
Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.

**Skipsførari**
Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár. 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara. Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum høvum.

Upptøka til skipara- og skipsføraraútbúgvingarnar er tvær ferðir um árið og byrjar aftur í januar 2007.

Maskinist- og maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

KREA.FO · TEL 47 80 80



Hevur tú hug at gerast maskinistur, maskinmeistari, skipari ella skipsførari? Set teg í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaði.

**Umsóknirnar skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 18. desember 2006.**
Umsóknarblað kann heintast á heimasíðu okkara

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstýrelsen og IMO.

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · vh@vh.fo · www.vh.fo